# KFUM-skótarnir í Føroyum

**Landsnevndarfundur** 04-03-14 Fundur nr.: 02-14

Stað: Skrivstovan hjá KFUM skótunum Dagfesting: 04-03-14

| Navn: | Tlf: | Mail: | Init | Uppmøtt: |
|---|---|---|---|---|
| Arne Debess Madsen | 290877 | arnedm82@gmail.com | ADM | Ja |
| Beinta Kollslíð | 287964 | beinta14@hotmail.com | BK | Ja |
| Olga Arnfinnsdóttir | 261770 | olga.arnfinnsdottir@gmail.com | OA | Nei |
| Bjarni Hentze | 222419 | bjahen@hotmail.com | BH | Ja |
| Oda Maria Johannesen | 270252 | om-johannesen@hotmail.com | ODJ | Ja |
| Bogi F. Christiansen | 507062 | bogifchr@gmail.com | BFC | Ja |
| Helgi Simonsen | 589159 | helgi.s@hotmail.com | HS | Ja |
| Karl Viðstein | 519690 | karlw.viðdstein@gmail.com | KV | Ja |
| Karl Aage Hansen | 505858 | karlaage@meyl.fo | KAH | Nei |
| Jóna Venned | 218332 | jonavenned@gmail.com | JV | Ja |
| Ingibjørg Johannesen | 588331 | ingjoh85@gmail.com | IJ | |

**Fundur settur:** 16.10

**Skrá:**

- Status á verkætlanum
- Gilwell skeið
- Leiðaraskeið
- Skrivstouvhald
- Ymiskt

**Status á ymsum verkætlanum.**

*Verkætlan 1- endurskoðan av instruktørskeiðum o.s.fr.*

Bogi hevur hugt eitt sindur uppá tað, men er steðgaður eitt sindur upp, av tí at hann ivaðist eitt sindur í hvat vit vilja við tí, um tað skal vera vinnuligt ella meira eitt skótavirksemi.

Um tað ikki skal vera vinnuligt, so selur man tað eitt sindur bíligari út til fólk og sigur at tað er eitt bíligt virksemi har pengarnir fara til eitt gott endamál.

Um tað skal vera minni vinnuligt, missa vit alt tað arbeiði sum fyrrverandi In hevur gjørt fyri Selatrað.

Um tað skal vera meira vinnuligt má trygdin upp, og instruktørskeiðini skulu upp á eitt hægri støði.

Upprunin við instruktørskeiðunum var at vit skuldu hava nakrar instrukørar og vit skuldu koma í gongd, tí valdi man at ikki gera tað á alt ov høgum støði at byrja við.

Nú er tíð uppá at vit fara í gongd við at hækka støði og trygdina samstundis.

Eitt uppskot er at man hevur ábyrgdarfólk og hjálparfólk, soleiðsi at har skulu vera min. tveir instruktørar á hvørjum aktiviteti, og ábyrgdarfólki skal vera eldri og hava "hægri" útbúgivng sum instruktør.

Instruktørskeiðini sum vit hava í dag eru væl passandi til hjálparfólk, og kan brúkast til tað, so skal eitt høgri og meira krevjandi skeið gerast til hjálparfólk.

Um man ger hetta, skal lønin til ábyrgdarfólkið setast upp.

Ein persónur skal hava ábyrgdina av útgerðini, og syrgja fyri at útgerðin er í lagið, og at útgerð verður keypt inn tá tað er neyðugt. Magni Laksáfoss vil gjarna vera ein sovorðin persónur.

Bogi heldur at hvør instruktørur skal fylla eina lítla "eftirmeting" út fyri høvnn aktivitet, har man viðmerkir hvuss gekk, hvat gekk galið o.s.fr. Har pengarnir eisini vera avleveraður.

### *Verkætlan 2 – Úlvakassar*

Beinta hevur gjørt ein úlvakassa við 1-hjálpartema og testa hann við sínum úlvum.

Næsti kassin er í gerð, og verður testaður av Hvalvíksskótunum. Tann næsti heuvr knútatema.

Tann triðji kassin hevur sjóræ naratema.

### *Verkætlan 3 – DPK,LPK*

Karl og Helgi hava hugt eftir DPK og LPK.

Í løtuni vilja øll sleppa  við á LPK men eingin tímir á DPK, hvussu broytir man tað.

Tað fyrsta uppskotið teir hava arbeitt við var at man hevði eina DPK, og tey sum kláraðu seg best á DPK sluppu við á LPK1 og hini sluppu við á LPK2. Teir blivu tó skjótt samdir um at hetta  var ikki eitt sera gott uppskot

næsta uppskot er at man hevur DPK1 sum er ein leygardagskapping og DPK2 sum er ein lega.

Øll sleppa við á hesi bæði tiltøkini og kunnu kappast á einum støði sum ger at øll kunnu vera við og hav tað skeg.

So sigur man at útfrá stigunum sum patrúljurnar fáa á DPK1 og 2 verður avgjørt hvør ið sleppur við á LPK.

Patuljunar noyðast ikki at vera fullmannaðar til DPK 1 og 2, men so leingi allir liminir hava veri við til aðra av tiltøkunum kan patrúljan sleppa við á LPK.

Teir hava nógv uppskot til nógvar ymsar broytingar, teir hava snakkað um, um teir skulu fara út og spyrja bólkarnar hvat skal  broytast, og hvussu tey vilja hava LPKina at vera.

Fleiri av bólkunum vita ikki hvat LPKin er og hvat hon gonur út uppá, tí hevði veri eitt gott hugskot at fari út í bólkarnar og reklamerað fyri henni.

Arne hevur eitt uppskot um at man kundi gjørt eina árskapping, har tað eru uml. 20 smærri uppgávur sum skótanir kunnu loysa úti í bólkunum, kappingin skal so koyra alt árið, og møguliga føra upp til LPK.

### *Verkætlan 4 – 75 ára hald og familjulegan*

Bjarni hevur snakkað við Dávur Reinert Hansen sum skipaði fyri Grøn framtíð, og fer á fund við hann.

Tey hava gjørt eitt møguligt design til eit legumerkið

Tey ætla at gera eina "legubók" við sangum o.s.fr.

Og so ætla tey at gera ymiskar sovenirs sum tey ætla at samstarva við Jógvan Weihe um.

Tey ætla at gera eitt stórt Føroyakort við skótaliljum á har sum skótabólkar eru, við upplýsingum um bólkarnar.

Tey ætla eisini at hava ein skerm við slideshowið við gomlum myndum.

Regin Debess Thomsen, Torstein Fríðfinsson og Bogi F. Christiansen standa fyri samskipanini av virkseminum.

Skótalegan sjálv skal byrja áðrenn familjulegan byrjar. Ætlanin er at tey fáa tveir dagar til at pionera leguøkið, so far tey á eina heik, og koma aftur til familjuleguna.

Uml. Tríggir danskir bólkar hav víst áhuga fyri at koma á leguna.

### *Verkætlan 5 – leiðarabútbúgvingar*

Vit skula gera eitt skeið har man greiðir frá hvat tað er at vera leiðari hjá KFUM-skótunum í Føroyum

Vit gera eitt úlvaleiðaraskeið, har man lærir hvussu man arbeiðir við børnum, hvat ger man fyri at fáa børn at lurta o.s.fr.

**Gilwell skeið:**

Gilwell skeið verður í 2015. áðrenn tað skula vit hava leiðarabyrjan, leiðaraskeið1 og leiðaraskeið 2.

**Leiðaraskeið:**

Vit hava brúk fyri leiðaraskeiðum. Har skal vera ein partur um landsarbeiði, tiltøk, og hvat fyri møguleikar tey hava.

Eitt uppskot er at man fer út til bólkarnar við leiðaraskeiðunum soleiðis at man fær so nógvar leiðarar við sum gjørligt.

**Skrivstovuhald:**

Vit ætla at seta ein persón avtrat til skrivstovuhald, Jóna fer at flyta av landinum í summar, so vit hava brúk fyri at seta ein persón sum kann setast inn í tingin áðrenn Jóna fer avstað. Arne skjýtur upp at vit seta Ingibjørg Johannesen. Nevndin góðkennir hetta.

**Ymiskt:**

Viðvíkjandi servara, so hendur einki har í løtuni, men vit hava valt at brúka Google drive fyribils til at deila allar fílir o.s.fr.

**Næsti fundur:** Týsdagin 1 apríl kl. 16.00

| | | | |
|---|---|---|---|
| Arne D. Madsen | Beinta Kollslíð | Bjarni Hentze | Oda Maria Johannesen |
| | | | |
| Bogi F. Christiansen | Helgi Simonsen | Karl W. Viðstein | |
| | | | |